Høllin kemur næsta ár

Heðin Mortensen, býráðslimur í Havn, var rættiliga í gávuhýri mánakvøldið og lovaði kollfirðingum ítróttarhøll komandi ár. Men kollfirðingar hildu, at hann vassaði so djúpt, at nú fekk hann saktans uppí

BORGARAFUNDUR
Edvard Joensen

Heðin Mortensen, býráðslimur, lovaði kollfirðingum ítróttarhøll í føðingardagsgávu komandi ár
Mynd: Edvard Joensen

Kollafirði: Kollafjarðar Ítróttarfelag fyllir 65 ár og fer at fáa eina ítróttarhøll í føðingardagsgávu komandi ár, segði Heðin Mortensen, býráðslimur í Havn, á borgarafundi í Kollafirði mánakvøldið.

Við tí meinti hann helst ikki, at høllin fer at standa púra liðug og klár at taka í nýtslu, men heldur, at byrjað verður upp á hana í komandi ári.

Heðin Mortensen metti, at tá ítróttarhøllin í Hoyvík verður liðug til nýggjárs, ber til at fara undir ta næstu, sum verður tann í Kollafirði.

Hetta gávumilda lyftið fegnaðust summir fundarluttakarar um, meðan onkur annar turrisliga helt fyri, at nú vassaði Heðin Mortensen so djúpt, at hann saktans fekk uppí.

Men teir lovaðu tó at minnast til tað, sum sagt var, og minna hann á tað aftur, sum fráliður.

Fólk, sum vara av Kollafjarðar Ítróttarfelag, KÍF, vístu á sera vánaligu venjingarumstøðurnar, felagið hevur.

Tað eru seliga tvær ítróttargreinar, sum kollfirðingar gera seg galdandi í. Menninir spæla hondbólt, og kvinnurnar flogbólt. Men tað er bara ein vanlig fimleikarahøll í bygdini at venja í, og tað ber als ikki til.

Víst vað á, at kvinnurnar hava spælt seg í meistaradeildina í flogbólti, men noyðast kanska at melda frá aftur, tí tær fáa ikki vant.

KÍF er eftir TB næststørsta flogbóltsfelag í landinum. Størri enn øll feløgini í Havn, varð undirstrikað. Men felagið hevur bara gólvpláss til at venja eitt lið í senn. Og tað merkist sjálvandi, varð ført fram.

Menninir, sum spæla hondbólt, hava einasta fyrstudeildarlið í landinum, sum bert hevur eina fimleikarahøll at venja í.

– Einar tveir tímar uttangarðs um vikuna, varð sagt og víst til, at kollfirðingar sleppa at venja onkra løtu í Vestmanna.

Men samstundis varð víst á, at teir tímarnir liggja so seint, at tá kollafjarðardreingir venja í høllini í Vestmanna, liggja allir vestmenningar langt undir dýnuni og sova.

Men nú man fara at hjálpa bæði við venjingartíðum og náttasvøvni hjá kollfirðingum, tí nú lovar býráðslimurin í Havn, at høllin kemur í komandi ári, hildu tey í Kollafirði mánakvøldið.

Ítróttarhøllin er ein luksustrupulleiki

Býráðslimurin hjá kollfirðingum helt á borgarafundi í Kollafirði mánakvøldið, at ítróttarhøllin er eitt luksusmál. Skúlin er meira átrokandi helt hann. Men ikki øll vóru samd

BORGARAFUNDUR
Edvard Joensen

Kollafirði: Tá kollfirðingar hildu borgarafund mánakvøldið, vóru ymsar meiningar um, hvørt skúli og ítrótarhøll skuldu byggjast í einum, ella hvørt sær. Men tey flestu vildu hava bæði.

Býráðslimurin og løgtingsmaðurin úr Kollafirði, Jákup Suni Joensen, helt, at ítróttarhøllin er ein luksustrupulleiki, sum kann raðfestan aftan á skúlan.

Klokkan er júst farin av sjey. Tað er mánakvøld, og kollfirðingar eru farnir, maður av húsi, í bygdarhúsið at hoyra, hvat býráðspolitikarar úr Havn og onnur, sum hava eitthvørt upp á hjarta, hava at siga um politisku støðuna í Kollafirði, nú kollfirðingar kenna seg tiknar við nøsina, tí útlitini fyri ítróttarhøll og skúla eru svinnandi.

Og teir komu og settust við pallborðið. Teir politikarar og fyrrverandi politikarar, sum høvdu við kommunusamanleggingina at gera, umframt onkur, sum er valdur í Tórshavnar Býráð eftir samanleggingina.

Ein teirra, sum sat við pallborðið í Kollafirði mánakvøldið, var fyrrverandi bygdarráðsformaðurin í Kollafirði, Hans Jacob Hansen.

Hann fegnaðist um samanleggingina, og vísti á alt tað virksemið, sum nú er inni á Langasandi. Tað hevði ikki verið komið, helt hann, um ikki varð lagt saman við Tórshavnar Kommunu. Og hann fekk undirtøku frá fleiri av fundarluttakarunum, sum høvdu orðið seinni.

Rás Tórshavn

Hóast kollfirðingar hava latið frætt, at teir fegnir vilja hava bæði ítróttarhøll og skúla, helt Leivur Hansen, býráðslimur og fyrrverandi borgarstjóri í Havn, ikki, at tað var tað stóra ynskið, seinast borgarafundur var í Kollafirði.

Hann segði seg minnast fyri vist, at tey allarstørstu ynskini hjá kollfirðingum tá vóru at sleppa at síggja Rás Tórshavn og koyra bíliga við Bussleiðini.

Tey ynskini eru bæði uppfylt, vísti Leivur Hansen, men ásannaði tó, at tað enn eru eini 20 hús í Kollafirði, sum ikki síggja Rás Tórshavn.

At ítróttarhøllin skuldi standa so øgiliga frammarlaga, helt hann, var komið upp seinni. Og eingin skrivlig avtala er gjørd um tað, vísti hann á.

Luksusprojekt

Kollfirðingurin í Tórshavnar Býráð, Jákup Suni Joensen, nevndi ítróttarhøllina fyri eitt luksusprojekt.

Við tí vildi hann siga, at tann trupuleikin, at kollfirðingar onga ítróttarhøll hava, var minni enn tann, at skúlavirðurskiftini í Kollafirði eru sera ring. Hann helt tó iki, at høllin átti at strikast, men heldur kundi hon verið raðfest aftan á skúlan.

Eisini helt Jákup Suni Joensen, at verkætlanin var í so stórsligin og dýr, og at tað gjørdi einki, um ein bíligari útgáva av ítróttarhøllini varð gjørd.

Tað varð víst á á fundinum, at gamla hallaranevndin var skift út við eina nýggja, og at hendan nýggja kanska ikki var so sinnað at gera høllina, nú ein var komin í Hoyvík.

Men Jákup Suni Joensen helt ikki, at nøkur grund var fyri at stúra fyri tí. Men hann heitti á fólk um at lata halarnevndina fáa frið at arbeiða, so skuldi nokk okkurt spyrjast burturúr.

Ymsir flokkar

Fundarfólkið fekk eisini mikrofonina, og ymiskt var, sum tey vildu raðfesta. Onkur vildi hava høllina beinanveg, og tann, sum før longst, helt, at tað gjørdi einki petti, um kollfirðingar fóru til Havnar í skúla, um bara ítróttarhøllin varð bygd.

Men tað verður nokk ikki bara sum at siga tað, varð upplýst, tí skúlarnir í Havn hava sanniliga eisini hølistrupuleikar, eins og tann í Kollafirði.

Onkur av pallborðsluttakarunum ávaraði í móti, at kollfirðingar býttu seg í tveir bólkar, soleiðis at tað gjørdust tey fyri skúlanum móti teimum fyri høllini. Tað fór at vera tað ringasta, sum kundi henda, varð hildið.

Ført varð fram, at tað var helst rættast at byggja upp í verandi skúla, sum gjørt hevur verið fyrr, og so fáa eina bíligari ítróttarhøll uttan skúlastovur. Tað vil siga eitt bygning í einari hædd uttan ta undirhæddina, sum annars var ætlað til serstovur.

Men tað hildu onnur ikki vera nakra góða loysn. Tað mátti tó verið bíligari at bygt saman og so fingið nýtt somu hentleikarnar í bæði skúla og høll. Hugsað varð um ymisk felagsrúm sum til dømis wc, baðirúm, goymslur og so framvegis.

Skúlaleiðarin í Kollafirði vísti á, at skúlin hevur út av lagi vánalig hølisviðurskifti, og hon heitti staðiliga á politikararnar um ikki at taka høllina fram um skúlan.

Ikki tí, at hon hevði nakað petti í móti høllini, segði hon. Men ásannaði bara, at um høllin fyrst varð bygd uttan skúlastovur, fór at verða seinur dagur, áðrenn nakað varð bygt afturat til skúla.

– Tað verður so ikki í mínari tíð, staðfesti hon.

Hons vísti á, at skúlin hevur onga skúlastovu, sum ætlað er til meira enn 15 børn, men at tað íðiliga ganga bæði 25 og upp til 28 børn í flokkunum, sum brúka stovurnar.

Hon visti, hvat hon tosaði um, og eingin var heldur í iva um eftir fundin, at kollfirðingar halda, at skúlamálið er sera átrokandi at fáa loyst.

Borgarafundurin í Kollafirði mánakvøldið var líka drúgvur, sum tann fyrsti fótbóltsdysturin, kollfirðingar sambært táttinum hjá bygdarmanninum Tonglatummasi, spældu móti hósvíkingum. Hann stóð í tímar trýggjar.

Nøgva fundarfólkið í Kollafirði mánakvøldið staðfestir týdningin, fólk leggja í ítróttarhøllina og skúlan
Mynd: Edvard Joensen

Vinnudagur í Norðurlandahúsinum

ÁRSINS VIRKI

Aftur í ár skipar Vinnuhúsið fyri einum vinnudegi í Norðurlandahúsinum. Á vinnudegnum fært tú møguleika at tosa við vinnulívsfólk og hoyra vinnulívsfólk greiða frá teirra royndum og hugsanum. Sum ein fastur táttur verður ársins virki valt. Seinasta ár var luttøkan stór - gev okkum tí boð um tína luttøku í góðari tíð.

Seinasta freist at melda seg til er 8. novembur.

Vinnudagurin verður fríggjadagin 16. novembur 2001.

VINNUHÚSIÐ
House of Industry
R. C. Effersøesgøta 30, FO-100 Tórshavn, Tel 31 18 64, Fax 31 72 78, industry@industry.fo

Stuðlað Vinnudegnum hava

ATLANTIC AIRWAYS · FØROYA SPARIKASSI · KAUPTHING · STATOIL · FØROYA BANKI · Shell

Skrá fyri vinnudagin:

KL. 14.00
Wilhelm Johannesen,
formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag
bjóðar vælkomin

Kl. 14.10
Bjarni Djurholm,
landsstýrismaður í Vinnumálum hugleiðir um vinnumynstur í framtíðini

Kl. 14.30
Ognarviðurskiftini í føroyskum vinnulívi.
Jørn Astrup Hansen,
stjóri Føroya Banka

Kl. 15.00
Heimurin eftir 11. septembur,
Ólavur Rasmussen,
prestur

Kl. 15.30
Steðgur - Kaffi

Kl. 16.00
Aljvinnan og framtíðin,
Tarald Sivertsen,
formaður í norska Havbúnaðarfelagnum

Kl.16.40
Arbeiðsmarknaðurin - tann globala avbjóðingin hjá Evropa, ***Poul Tørring,***
stjóri í Ultzon

Kl. 17.20
Stuttur steðgur

Kl. 17.30
Heiðursprógv fyri serligt átak

Kl. 17.40
Ársins virkið 2001
verður kosið

Kl. 18.00
Líðugt í Norðurlandahúsinum

Kl. 19.30
Galladøgurði
á Hotel Føroyum

Meira um tiltakið er at finna á heimasíðu okkara www.industry.fo